

*Guðrun&Guðrun ganga enn einaferð undan, og vísa, at tað ómøguliga er møguligt. Til altjóða mótashowið, sum tær mánadagin skipa fyri í hangarinum í Vágum, hava tær leigað eitt flogfar, og flúgva so gestir, útlendskar mótamiðlar og innkeyparar til Føroya*
*Myndir: Hans Andreas á Brúnni*

# Mega mótashow



*Myndir frá vár/summar kollektiónini 2008. Tað verður tó heyst/vetur kollektiónin, sum verður sýnd í hangarinum á flogvøllinum mánadagin*
*Myndir: www.gudrunoggudrun.com*

## Rás2, Portalurin og kykmyndir

MÓTASHOW
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

**Mótashowið hjá Guðrun&Guðrun vesturi á flogvøllinum verður bert fyri innbodnum. 150 útlendskir gestir og 350 føroyskir gestir eru bodnir til tiltakið. Men um tit kundu hugsað tykkum at fylgt við í, hvat fer fram mánadagin, so er bara at seta á Rás2, sum fer at senda beinleiðis frá tiltakinum. Harafturat verða fólk frá Portalinum við allan dagin, myndir og kykmyndir verða lagdar út leypandi ígjøgnum alt tiltakið.**

verður hildin, ikki eru sum hini. Vit hava júst gjørt okkara fyrstumannfólka-kollektión, sum verður víst á messuni í Keypmannahavn. Og við tiltakinum í Føroyum, fara vit at vera tær, sum júst hava hildið eitt spennandi og øðrvísi altjóð tiltak í heimlandinum, so vónandi fer tað at seta eyka fokus á okkum, ístaðin fyri, at vit bert eru mótashow nr. 27 á mótamessuni, vísir Guðrun á.

Hon sigur eisini, at reaktiónirnar, sum hon hevur fingið frá teimum innbodnu, hava verið sera positivar.

- Tey flestu eru rættiliga stressað í hesum døgum, bæði fjølmiðlafólk og keyparar, tí stóra mótamessan í Keypmannahavn krevur nógva fyrireiking. Men tey hava tó tikið ein heilan dag úr kalendaranum, fyri at koma til Føroya, tí tey hildu hetta vera so áhugavert. Tað prógvar, at tað loysir seg at gera nakað øðrvísi, vísir Guðrun Rógvadóttir á.

## Tað almenna stuðlar ikki

**Hóast hetta er eitt sera slóbrótandi tiltak, sum setir Føroyar í fokus, so hava Guðrun og Guðrun ikki fingið nakran almennan stuðul. Orsøkin er, at tað almenna stuðlar bert tiltøkum, sum verða hildin uttanlands. – Hesar reglurnar eru jú heilt burturvið, sigur Guðrun Rógvadóttir**

MÓTASHOW

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Tær leiga eitt flogfar, fult av gestum úr Danmark og niðuraftur. Tær hava fingið hendur á hangarinum. Tær leiga bussar at koyra fremmandu gestirnar til Havnar. Tær hava eina reseptión fyri útlendsku gestunum í Müllers Pakkhúsi. Tær bjóða mat og drekka. Og tær hava leigað Teit Lassen at spæla fyri gestunum. Tað sigur seg sjálvt, at hetta er ikki eitt bíligt tiltak.

Hvussu kann eitt lítið felag sum Guðrun og Guðrun hava ráð til eitt so ógvusligt marknaðarføringstiltak?

- Vit hava fingið samstarv við fimm virki, sum eru við sum fíggjarligur stuðlar. Annars hevði tað ikki latið seg gera! Men vit hava ongan almennan stuðul fingið, hóast vit hava royndt, tí reglurnar eru ov stirvnar, greiðir Guðrun frá.

Hon sipar til, at almennur stuðul verður bert latin, um skipað verður fyri tiltøkum, sum verða hildin uttanlands. Verða tiltøkini hildin í Føroyum, verður eingin stuðul latin.

- Her haldi eg altso, at reglurnar eru ov stirvnar. Tað er jú hol í høvdið, at tá vit ætla at bróta upp úr nýggjum, og flyta umheimin til Føroya, so vit kunnu vísa øllum hvaðani vit eru, og hvaðani íblásturin kemur frá, so fáa vit ongan stuðul. Tí lógin forbjóðar tí. Men høvdu vit tikið okkara kollektión til Danmarkar, og gjørt eitt tiltak har, so hevði ikki verið nakað í vegin fyri at fingið stuðul. Hetta er ein trupulleiki, staðfestir Guðrun Rógvadóttir.